# HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?




Vikuskiftisvaktin hjá

**SOSIALINUM & PORTALINUM**

er at hitta alt vikuskiftið á

**TELEFON 22 50 00**

Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum

VIVA

# SERNÁMSDEPILIN

## Sálarfrøðingur í NSR tænastuni í Eysturoy

**Í Sernámsdeplinum er eitt sálarfrøðistarv leyst til setan skjótast til ber. Dagliga tænastustaðið er í NSR tænastuni í Eysturoy, Glyvravegur 10 B, Glyvrar.**

**NSR tænastan** er eitt samtak ímillum Sernámsdepilin og Runavíkar-, Nes-, Sjóvar-, Leirvíkar-, Gøtu- og Fuglafjarðar kommunur. NSR tænastan virkar sum sjálvstøðugur stovnur undir Sernámsdeplinum og veitir skúlum, stovnum, foreldrum og myndugleikum námsfrøðiliga- og sálarfrøðiliga ráðgeving.

Høvuðsuppgávan hjá NSR tænastun er at kanna førleikastøðu og læruumstøður hjá børnum við serligum tørv og at ráðgeva í skipan av undirvísingarligum- og mennandi tiltøkum fyri hesi. Manningin í NSR tænastuni er ein samskipari, ein sálarfrøðingur og 3 serlærarar/ ráðgevar

Sálarfrøðingurin, ið vit sóknast eftir, hevur ein týðandi lut í hesum toymi, ið í samstarvi við Sernámsdepilin støðugt skal menna sernámsfrøðiliga virksemið.

**Útbúgvingarkrøv og eginleikar**

- Cand. ped. psyk./ cand. psyk. – ella samsvarandi. Fyrimun hevur umsøkjari, ið hevur arbeitt við børnum.
- Fakligan førleika og hug at arbeiða bæði við kliniskt – psykologiskum og pedagogiskt – psykologiskum uppgávum.
- Duga at nýta kanningarúrslit í ítøkiligum undirvísingar – og viðgerðartilmælum.
- Hava hug og evni til neyvt samstarv við aðrar fakbólkar.
- Vitan um nervasálarlig greiningaramboð er eisini ein fyrimunur.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Hans Eli Dahl, stjóra, tlf. 314522/ 225803, (e- mail hanseli@snd.fo) ella Hans Jón Juul Thomsen, samskipara, tlf. 239190, (e- mail hjt@nsreystur.fo)

Umsókn við avriti av próvskjølum v. m. skal vera Sernámsdeplinum í hendi í senasta lagi fríggjadagin tann 31. august 2007 og skal sendast til:

**Sernámsdepilin**
Frælsið 32 · Postrúm 2036
FO 165 Argir · Tlf. 314522
e-postur: sernamsdepilin@snd.fo

# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Ergoterapeutur til Landssjúkrahúsið

Eitt starv sum avloysari sum ergoterapeut á somatisku deild er leyst at søkja til setan 1. september 2007 til og við 31.aug 2008.

**Vit kunnu bjóða** tær eitt arbeiðspláss í menning við fakligum og persónligum avbjóðingum, har tú fært møguleikan fyri at luttaka í okkara ergoterapeutiska toymi og í einum tvørfakligum toymi.

Ergoterapiin fevnir um tvær deildir ávíkavist psykiatrisku og somatisku deild og hava vit ein felags leiðara, sum í løtuni hevur sína dagligu gongd á psykiatrirsku deild. Á psykiatrisku deild eru 4 ergoterapeutar. Á Somatisku deild eru 3 ergoterapeutar.
Á Landssjúkrahúsinum verður í løtuni arbeitt við at broyta leiðslubygnaðin. Hetta inniber, at ergoterapiin og fysioterapiin eru løgd um til eina rehabiliteringseind undir leiðslu av medisinsku depilsleiðsluni.

**Arbeiðsuppgávur**
Í ergoterapiini brúka vit eina Canadiska fyrimynd sum fatanatgrundarlag. Ergoterapeutrin kemur at luttaka í viðgerðini av innløgdum sjúklingum, (hemiplegi, RA og aðrar medisinskar sjúkur) ambulantum brúkarum, (hondkirurgiskir) ráðgeva og vegleiða sjúklingum og avvarandi um broytingar í heiminum.

**Vit leggja dent** á persónligar eginleikar, so sum greiða talu og gott arbeiðslag.

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Kirstin Ellingsgaard, leiðandi ergoterapeut, lokal 5782 ella Súnu Mørk, deildarergoterapeut á tlf. 515589.

**Umsóknarfreist:** 27. august 2007 kl. 12.00

## Onnur Størv (sí meira á www.lsh.fo)

**Heilsurøktari / sjúkrahjálpari til E3/E2.**
Umsóknarfreist er 20. august 2007 kl 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur B7.**
Umsóknarfreist er 24. august 2007 kl.12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar til Barnadeildina**
Umsóknarfreist er 20. august 2007 kl.12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur til B6**
Umsóknarfreist er 20. august 2007 kl.12.00

**Deildarleiðara til B8**
Umsóknarfreist er 13. august 2007 kl.12.00

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Umsóknin skal vera Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
**Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO 100 Tórshavn**







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo